VALGREINAR

# Løgregla og dómsvald varðveitast í verandi líki

**Jan Poulsen**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Tá ført hevur verið fram av fráfarandi samgongu, at løgregla og dómsvald skulu yvirtakast, og sagt verður, at tað bert kemur at kosta landskassanum uml. 40 mió kr, er hettar beinleiðis lygn.

Lønir til tey, sum arbeiða á hesum stovnum liggur um 50 mió og harafturat koma útreiðslur til útbúnaðin, so sum bilar, motorsúkklur, hølir, telduútbúnað, klæðir, skógvar o.a.

Eftir hesum at døma dugir ein og hvør at síggja, at tað verður nógv dýrari at reka løgreglu og dómsvald, enn fráfarandi samgonga hevur ført fram.

Hetta er bert eitt dømi um, hvussu fráfarandi samgonga hevur borið seg at, tá teir hava skulað fortalt Føroya fólki, hvat tað kostar at yvirtaka.

Av lønunum sum eru goldnar av danska statskassanum, fer uml. helvtin í beinleiðis skatti niður í lands- og kommunukassan, meðan hin helvtin fer í umfar í landinum, til keyp av mati, klæðum og øðrum, og ger soleiðis, at onnur eisini njóta gott av hesum.

Harafturat skal eisini hugsast um, at av keypta útbúnaðinum fara 25 % av fakturaprísinum beinleiðis í landskassan sum mvg, tvs. rein inntøka.

Eisini skal hugsast um, at viðlíkahald av bilum, teldum o.ø. verður gjørt her á landi, og skapar arbeiði, og verður hetta eisini goldið úr danska statskassanum.

Afturat hesum fær løgreglan í Føroyum hjálp frá løgregluni í Danmark, tá t.d. álvarslig mál eru sum skulu kannast. Her verður hugsað um tað serkønu hjálp, sum vit ikki hava í Føroyum, so sum serkøna tekniska hjálp við eldsbrunar, tá skotið verður við vápnum, líksýn o.a.

Tey seinastu dømini um stór mál, har vit hava fingið hjálp frá donsku løgregluni, eru Poul Watson og fótbóltslandsdysturin móti Týsklandi.

Alt hetta kostar eina rúgvu av pengum, sum danski statskassin rindar, og verður løgreglan yvirtikin, skulu vit sjálvi rinda tað.

At útbúgva ein løgreglumann/kvinnu kostar eina góða mió kr., og harafturat koma so viðlíkahaldsútbúgvingar, víðariútbúgvingar og annað.

Tað kann eisini hugsast, at tað kann verða ein trupulleiki, at landsstýri/løgting skal ráða yvir løgregluni, av tí at samfelagið er so lítið.

Hvat um ein landsstýrismaður/løgtingsmaður verður tikin fyri eitthvørt lógarbrot, kann hann so ávirka gongdina í málinum? Eg spyrji, tí tað er heilt víst vert at hugsa um.

Nei, lat løgreglu og dómsvald fáa frið í verandi líki, soleiðis at Føroya fólk kunnu vera trygg við tað, sum tey altíð hava verið.

Danska og harvið eisini føroyska løgreglan er sera høgt í metum allastaðni í verðini, har tey eru oddamenn allastaðni fyri alltjóða løgreglulið, sum royna at halda skil á í ymiskum londum. Tað feskasta dømið er Irak, har leiðarin av løgregluni er danskari.

Útbúgvingin hjá donsku løgregluni verður hildin at vera ein tann allarbesta løgregluútbúgvingin í heiminum og er rættartrygdin eisini hareftir.

Við Javnaðarflokkinum í landsstýrinum tey næstu 4 árini verður løgregla og dómsvald ikki yvirtikið, okkum øllum til frama og tryggleika.

Far á val 20. januar og set kross tín við ein sterkan Javnaðarflokk.

# Vit mugu tora at rationalisera og hugsa øðrvísi

**Jón Ellendersen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



Hvør minnist ikki hugin til arbeiði í 80unum, áðrenn kreppan tók seg upp. Men meginorsøkin til henda arbeiðshug var, at skattatrýstið var so lágt, ja, lægri enn í grannalondum okkara.

Men ber tað til at fáa skattatrýstið niðuraftur og at vaksa um hugin til arbeiði, sum í hesum døgum er á lágmarkinum vegna ov stórt skattatrýst, ov nógv og høg avgjøld og alt, alt ov høgar prísir á øllum frá mjólk til íbúðir og hús.

Saman við eini rationellari og yvirskotsgevandi fiskivinnu, kann hetta virka til, at búskapurin aftur fer at blóma um ikki so langa tíð?

Hondina á hjartað, JA!

Flestu flokkarnir hava tosað um skattalætta uppundir valið, og summir hava verið í so kreativir við lyftunum. Lisbeth Petersen segði úti á Læraraskúlanum í gjárkvøldið, at loysning hjá Sambandsflokkinum var "hemmelig", og tá valevni úr Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum verða spurd, koma teir ikki við nøkrum ítøkiligum um, hvussu hetta skal loysast og fíggjast.

Men sum eg fyrr havi nevnt, so er ein sektorur, sum heilt avgjørt kann rationaliserast so gjøgnumgrípandi, at stórar sparingar kunnu gerast. Hesin sektor er almannaverkið, sum tá tað snýr seg um býti millum umsiting og reellar sosialar veitingar, sum koma brúkarunum til góðar stendur fyri hesum skelkandi tølum: 75 til 80% til umsitingina og 20 til 25% til brúkaran. (kanska tølini eru lægri, men siga vit, at býtið er 65 til 75% til umsitingina og 25 til 35% tilbrúkaran, so er líka galið).

Tað er eingin ivi um, at her skal vendast á høvdið so umsitingin maksimum stendur fyri 30% av játtanunum, meðan tey 70% koma brúkarunum, har í millum Heimarøktini, til góðar. Men enn havi eg ikki hoyrt nakrar ítøkiligar ætlanir um at fara undir at kanna henda skeivleika og taka fylgjurnar. Vituligt er, at var hetta ein privat fyritøka, so var øll leiðslan koyrd til hús, tí einki virki kann koyra við eini so fíggjarliga krevjandi umsiting.

Nakrar av orsøkunum til henda skeivleika eru, sum eg fyrr havi nevnt:

- ov mong lið eru um at viðgera hvørt einkult mál
- ov langar og bureaukratiskar mannagongdir, sum krevja alt ov nógv fólk
- eingin miðfyrisiting er at taka sær av málum, sum fevna um fleiri ymsar stovnar, og har ein tílik møguliga er, virkar hon illa
- tað eru ikki nóg greiðar linjur um hvør hevur avgerðarrættin í hvørum
- alt ov mong mál verða viðgjørd av fólki, sum ikki hevur nóg gott innlit í fakliga partin av málinum
- landsstýrismaðurin hevur blandað seg persónliga í alt ov mong mál, hetta hevur økt um arbeiðsbyrðina og longt um viðgerðartíðina
- persónlig sjónarmið verða alt ov ofta blandað inn í málsviðgerðina

Eg havi sjálvandi eingi tøl fyri, hvussu stórar sparingarnar kunnu vera, men verða rationaliseringarnar gjørdar, so loysa vit samstundis vantandi játtan til Heimarøktina, vantandi játtanir til Røktar- og Ellisheim, og so kann Ökisterapiin, jólatrøllið hjá Páll á Reynatúgvu, fáast at virka.

Fæst Ökisterapiin at virka, so eru aftur sparingar at heinta, tí við tað, at fysio- og ergoterapeutar koma afturat at viðgera /afturvenja fók í egnum heimi aftaná skaðar, skurðviðgerðir v.m., verður tørvurin á Heimarøkt minni, og so er møguleikin hjá teimum eldri at verða verandi í egnum heimi longdur við fleiri árum.

Í sama viðfangi kann eg nevna, at verður ein verulig afturvenjingardepil fyri heilaskadd, bæði apopleksirakt og fólk við ferðslu- og fallskaðum settur í verk, kann hetta spara samfelagnum nógvar krónur. Hvørt vunnið stig í afturvenjingini er tað sama sum spardar útreiðslur, tí brúkarin gerst meiri sjálvbjargin. Og lat meg beinavegin siga, at afturvenjingardepilin, Páll á Reynatúgvu setti á stovn í Havn, als ikki røkkur hetta endamál, tí starvsfólkið hevur hvørki fakligar kvalifikatiónir so sum útbúgving ella royndir, og har eru eingir nervanámsfrøðingar, fysio- ella ergoterapeutar.

Nú nevndi eg fiskivinnuna í byrjanini, men hetta fari eg sjálvandi at lata onnur, sum hava betri skil á hesum, koma við loysnum uppá. Men eitt uppskot havi eg tó:

Hví framleiða føroyingar ikki Sushi? Sushi er ráðir fiska/ laksabitar, umvundir við turkaðum tara, sum gongur sum heitt breyð í øllum størri býum í Evropu og USA, og í Japan er hetta ein av høvuðsrættunum. Vit hava fiskin, vit hava virkini og vit hava taran, og lítið skal til av umlegging til tess at fáa hesa vinnu at virka.

Ein føroyingur hevur eitt sushivirki í Danmørk, og gongur hetta rættiliga gott, og eingin ivi er um, at eftirspurningurin á Sushi er vaksandi so hvørt sum hesin úrdráttur verður útbreiddur, og tað verður hann. Tað er m.a. "IN" at eta Sushi, og so er tað sera heilsugott.

Hetta var bert ein hugleiðing um øki, har tað ber til at seta inn, og tað er yvirhøvur eingin ivi um, at verður almannaverkið rationaliserað, so sparir tað samfelagnum hópin av peningi. At tað so rúka nøkur arbeiðspláss í hesum høpi, má so vera, tí landið kann ikki skapa arbeiðspláss bert fyri at skapa tey. Tað skal verða nytta og produktivitetur í hvørjum einasta almennum arbeiðsplássi. Tað almenna skal ikki virka sum ein fjaldur sosialur stuðulsveitari ella arbeiðsloysisstuðul.

Men tað er eingin ivi um, at verða rationaliseringarnar framdar, so verður brúk fyri fleiri fólki til Ökisterapiina og eina Heimarøkt, sum tá kann effektiviserast, uttan at hetta fer at senda útreiðslurnar í veðrið.

Gott val.

X við D gevur Demokrati

# Verjið reina umhvørvið

**Rani Nolsøe**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Norðoyggjum*



Tá fólk úti í heimi síggja føroyskar vørur, skal rein og óspilt náttúra vera fremsta spjaldramerkið. Føroyskar vørur skulu altíð vera ímyndin uppá eina reina og trygga framleiðslu.

Men tað krevur, at vit beinanvegin koma úr tí dvala, sum hevur eyðkent politikkin á umhvørvisøkinum, tí hetta øki hevur ligið uttan nakra veruliga politiska drívmegi alt ov leingi.

Tjóðveldisflokurin fer at arbeiða fyri, at komandi løgting beinanvegin fer í gongd við at fáa ein vælumhugsaðan og sterkan umhvørvispolitikk settan í verk.

Tað skal tryggja, at okkara góða kappingarfortreyt á altjóða marknaðinum altíð verður ein framleiðsla av fiskavørum í einum reinum umhvørvi á havi og á landi.

Tað verður eisini berandi undir Føroyum sum framtíðar ferðalandi, tí tað fer at geva Føroyum eina týdningarmikla virðing og áhuga millum lond.

Tí fer Tjóðveldisflokkurin at arbeiða fyri at styrkja umhvørvispolitikkin á øllum økjum.

Vit vilja, at ætlanin fyri útbygging av vatnorku hjá SEV í Eysturoynni verður endurskoðað.

At Agenda 21 skrivstova beinanvegin verður sett á stovn.

At privatir alternativir orkuhættir fáa góðar møguleikar.

Tjóðveldisflokkurin fer eisini í Norðurlandaráðinum at skjóta upp, at vit fáa ein norðurlendskan granskingarstovn fyri havumhvørvi og veðurlagsbroytingar settan á stovn í Føroyum.

Veljið framtíðina - veljið Tjóðvekdisflokkin.



VALGREINAR

# Vit verja vunnin rættindi!

**Sverre Midjord**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy*



John Nielsen, valevni Miðfloksins vil jarðleggja arbeiðspláss á Tvøroyri.

Suðuroyingar! Tað verða tit sum koma at avgera hvussu leikur fer fram, tykkara atkvøða verður avgerandi um eitt skifti skal fara fram í landsins stýri.

Og eitt skifti skal fara fram. Her hjá okkum eru tað nógvar familjur sum liva av útróðri. Men hvat hava hesar fingið at vita, teirra inntøkutrygd skal skerjast - henda trygdin, sum varð løgd undir okkara stýri í Tinganesi - henda trygdin skal nú skerjast. Uppskot er lagt fyri tingið og tað verður framt um henda samgonga fær loyvi at halda fram.

Avgerðin er tín.

Eitt er greitt og tað er, at inntøkutrygdin hjá útróðrarmonnum verður ikki skerd um Javnaðarflokkurin fær dyggan stuðul.

Útróður er ein gamal rættur, sum vit vilja varðveita og stuðla. Verður trygdin skerd, so verður útróðurin bert søga.

Tit avgera tykkara egnu lagnu. Við at velja ein sterkan Javnaðarflokk inn á ting, verður inntøkutrygd tykkara ikki skerd.

Tað, sum valevni Miðfloksins boðar frá, eru ófrættatíðindi fyri Suðuroynna.

Javnaðarflokkurin fer at loysa teir trupulleikar hesum viðvíkjandi.

Fyrst avtøku av inntøku trygdini hjá útróðrarmonnum og so jarðleggjan av arbeiðsplássum, tað eru teir kostir, sum samgongan boðar frá.

Javnaðarflokkurin verjir vunnin rættindi.

# Arbeiðarin

**Dan R. Petersen**
*Valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy*



Boðini frá sambandi og fólkaflokki og tí borgarliga partinum av fakrørsluni eru greið: Tann, ið hevur tað váta, tað skitna og tað kalda arbeiði við tí lágu lønini og bert við eini almennari hungurspensión á gamalsaldri, skal duga sær hógv, tá lønarsamráðingar koma fyri aftur. Fólk verða gjørd til skiftisavlop og undirskot.

Fyri meg er hetta ein spurningur um moral og anstendigheit. Vit hava ein stóran og skjóttvaksandi akademiskan yvirklassa í Havn, har maður og kona lættliga draga fýra arbeiðaralønir í hús hvønn mánað. Miðfyrisitingin er trýfaldað síðan fullveldisskútan tók við í 1998. Hví fokuserar ongin upp á hesi viðurskiftir.

Og stjóralønirnar? Onkur kundi lættliga skorið eina millión av lønini. Tað hevði hjálpt upp á ársroknskapin. Men nei, flakakonan fær ov nógv, verður sagt. Hví tosar Vinnuhúsið ikki um produktforedling og nicheproduktión. Hvussu slepst undan millumhandlarum av keikantinum til brúkarin í Týsklandi. Nær tosar vinnuhúsið um útbúgvingarmøguleikar og skeiðsvirksemi hjá arbeiðsfólkinum? Torir Vinnuhúsið at samanbera tey sosialu viðurskiftini hjá tí føroyska arbeiðaranum við okkara grannalond. Nei. Tøgn valdar um alt uttan lønina.

Tað eru privat virkirgott nokk hava tey gjørt seg leys av beinleiðis fiskaarbeiði- har nógv verður gjørt við trivnaðin og tann sosiala partin av arbeiðslívinum sum t.d. útbúgving. Slík virkir eiga við lóggávu at stuðlast. Og tað vil javnaðarflokkurin.

# Almenni sektorurin

**Sámal Petur í Grund**
*valevndi Sjálvstýrisfloksinsí Suðurstreymoy.*



Er tað rætt, at jonglera við almennum starvsflólki upp undir val?

Almenni sektorurin er av álvara drigin inn í valstríðið hesaferð. Javnaðarflokkurin legði hart út, við at trí aðalráð skuldu niðurleggjast.

Stutt eftir hesa ramligu fráboðan, boðaði flokkurin tó frá, helst kroystur av sínum egnu, at tað bert var aðalstjórarnir sum skuldu sigast úr starvi.

At aðalstjórarnir ikki skuldu vænta sær annað starv innan tað almenna, framgekk av sparingini sum stóðst av niðurløgdu størvunum.

At ein flokkur hevur eina meining um hvussu almenna fyrisitingin skal skipast, er ikki annað enn rímuligt. Men at ein flokkur tilletur sær at jonglera við almennum starvsfólki - sum valagn, tað er ov langt úti.

Hendan sparingin hjá Javnaðarflokkinum kemur helst at kennast ein stokkutur hiti, tá hon á ongan hátt kemur í nærheitina av at fíggja hini vallyfti flokksins.

Tað sum vit allarminst hava brúk fyri, nú búskaparfrøðingar og fíggjarheimurin yvirhøvur, ávara um ein støðg í búskaparvøkstrinum, er ótryggleiki í fyrisitingini.

Tað kann ikki vera rætt í hesum tíðum, at skjóta pílar eftir teimum sum hóast alt eru tey sum skulu standa lið um lið við við teim politikarum sum eftir valið skulu stjórna landinum.

Sjálvstýrisflokkurin hevur sett sær sum eitt mál, at skapa tryggleika um bæði vinnu og fyrisiting.

# Vælferðarsamfelagið Føroyar

**Marja Lamhauge**
*valevni Sambandfloksins í Eysturoy*
*marja@post.olivant.fo*
*heima.olivant.fo/~marja*



Vit ynskja øll at búgva í einum vælferðarsamfelag.

Fyri at fáa eitt samfelag at virka optimalt, mugu øll hava tað gott.

- Vinnan má hava røttu karmarnar at arbeiða undir.
- Avkasti má verða so mikið stórt, at vinnan hevur ráð og møguleikar at endurnýggja seg.
- Arbeiði skal vera tøkt til allar vinnuførar hendur soleiðis, at har hugur og áræði er hjá fólki, ið vil verða í vinnu, mugu møguleikarnir ikki vera skerdir.
- Børnini og tey ungu skulu hava góð og mannsømilig kor at vaksa upp undir.
- Tey gomlu, ið ynskja- og ella hava tørv á at koma á eitt ellisheim ella sambýli, skulu hava møguleika fyri tí.

Fyri at náa hesum máli "vælferðarsamfelagið Føroyar", heita eg á tykkum um at velja ein sterkan sambandsflokk inn á ting 20 januar.

Gott val

# Skálafjørðurin miðdepil

**Sunleiv Højgaard**
*valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy*



Samanbinding vildi gjørt fjørðin enn meira dynamiskan.

Tankar hava verið frammi um sambinding av Skálafjørðinum. Fast samband millum Strendur og Saltnes. Ein framúr góð ætlan, sum hevði spart seg innaftur eftir ikki so langari tíð.

Sum er, er virksemið stórt um fjørðin, og vildi ein samanbinding givið fólkinum um fjørðin enn størri møguleikar fyri samstarvi, tað verið seg á vinnuliga, mentunarliga og ítróttarliga økinum. Ein miðdepil, sum kundi skapt enn betri karmar fyri okkum, sum búleikast um fjørðin.

Tá ið talan er um samstarv, liggja ikki so fáir møguleikar í hesi ætlan, og kundi samstarvið, sum longu er millum kommunurnar fingið heilt aðrar dimensiónir sum frálíður. Eldri sum yngri kundu fingið eitt enn meir fjøltáttað tilboð, og ungdómsarbeiðið hevði við hesi farleið kunna samskipast báðar vegir.

Ein slíkur miðdepil eigur at geva møguleikar fyri fleiri nýskapandi vinnum, har eisini ein partur av landsumsitingini átti at verið.

At tey sum vald verða, eiga at hava hetta við í skjáttuni, tá raðfestingar á samferðsluøkinum verða gjørdar eftir valið, má verða eitt krav higani.

# Smyril skal hava fast atløgupláss í Tórshavn

**Finnleif Guttesen**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



At leggja Smyril á Gomlurætt, Sund ella Kollafjørð blívur ikki góðtikið.

Tað er eitt rímiligt krav frá øllum suðuroyingum, til komandi samgongu, at landið átekur sær útreiðslurnar og syrgir fyri, at Smyril fær eitt fast atløgupláss í Tórshavn, suðuroyingar kunnu ikki góðtaka nakað annað.